VEÐRIÐ

Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið



Veðrið í dag :
Hann minkar vindin niður í lot av útnyrðingi, um kvøldið lot av eystri. Turt og sólglottar og hitin millum 4 og 7 stig.



Veðrið leygardagin:
Andøvsgul upp í ein strúk av landnyrðingi, seinnapartin veksur hann vindin upp í hvassan vind.Yvirhøvur turt og sólglottar og hitin millum 7 og 10 stig.



Veðrið sunnudagin:
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av norði og landnyrðingi og ælingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 6 og 9 stig.

Veðrið mánadagin og týsdagin:
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av norði og landnyrðingi, týsdagin minni vindur. Sólglottar, men kanska okkurt ælið. Hitin millum 4 og 8 stig.

Latum okkum dansa ein tango

Niels Uni Dam
nielsuni@sosialurin.fo

Í kvøld fríggjakvøldið verður ad Libitum kvøld í miðbýnum í Havn. Føroya elsti og besti easy listening bólkur ad Libitum spælir fyrst til hugnakvøld í Miðlahúsinum í Vágsbotni, og síðan til dans á REX. Bólkurin fer at spæla lætt lurtbæran tónleik, sum teir hava gjørt tað seinastu 32 árini. Sum altíð er tað spæligleðin, sum er drívmegin.

Ad Libitum hevur havt nógvar og skiftandi gestasangarar hesi árini. Herman Jacobsen var fæstur fúsur í nógv ár, og tá hann gav plátuna "Herman Jacobsen syngur Evert Taube og aðrar" út, var tað ad Libitum, sum spældi undir. Henda pláta gjørdist ein varði í føroyskari tónleikasøgu.

Í kvøld verður eisini gestasangari við, eingin minni enn Robert McBirnie verður aftan mikrofonina, og ad Libitum lova, at okkurt lag av plátuni við Hermanni verður at hoyra. Jógvan Dahl verður gestatónleikari og hann og Robert fara eisini at spæla nøkur løg saman.

Hugnakvøldið í Miðlahúsinum í Vágsbotni, byrjar klokkan 21.00, og er umleið hálvan annan tíma. Almenni dansurin á REX er frá klokkan 23.00.

Tað eru Miðlahúsið og REX í felag, sum skipa fyri tiltøkunum.

Thomas M. Smith teknaði ad Libitum í 79





Herman Jacobsen, sáli var ein livandi partur av ad Libitum í síni tíð

Hitalagið kring knøttin

Illulisat	6
Nuuk	--
Qaqortoq	7
Ammassalik	7
Saint John's	--
Halifax	--
Reykjavík	5
Seyðisfjørður	0
Tórshavn	7
Lerwick	10
Aberdeen	11
London	15
Tromsø	12
Bergen	13
Oslo	--
Stokkhólm	18
Keypmannah.	15
Helsinki	20
Moskva	30
Berlin	19
Warzawa	22
Kiev	28
Bukarest	22
Paris	17
Madrid	21
Róm	24
Malorca	23
Athen	25
Malta	23
Tunis	32
Beijing	24
New Dehli	39
Bangkok	33
Jakarta	32
Sydney	16
New York	15
Miami	29
Los Angeles	21
Meksikobýur	24
Panama	--
La Paz	14
Rio de Janeiro	--
Buenos Aires	16

LUFTTRÝSTIÐ

Í gjár:
Eitt lágtrýst, 1000 hPa. við Hebridurnar fer skjótt í landnyrðing og dýpist. Eitt hátrýst, 1028 hPa. sunnan fyri Hvarvið fer eystureftir og ein hátrýstryggur til Íslands kemur handavegin

Í dag:
Hátrýstið yvir Íslandi stendur mestsum í stað. Lágtrýstið í útsynning úr Írlandi fer móti Skotlandi.

I EINUM SAMFELAG
HAR TEY VEIKASTU
HAVA TAÐ GOTT,
HAVA ØLL TAÐ GOTT

WWW.JAVNI.FO

JAVNI

HITALAGIÐ



Hitalagið mált frá 23/5 kl. 06⁰⁰– 24/5. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 5,1°
Minsti hiti máldur í mai: -3,0° - Mesti hiti máldur í mai: 19,7°

AVFALLIÐ



Avfallið: 0,0 mm – mált frá 23/5 kl. 06⁰⁰– 24/5 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í mai: 38,0 mm

Sosialurin

VESTFALLSKYRRINDI

23. mai	Fullmáni
26. mai	Mánin næstur jørðini
30. mai	Seinna kvarter

Kelda: Almanakkin 2005

Dagur	Suðuroyar-/ Vágafirði fp.	sp.	Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp.	sp.	Hestfirði/ Sundalagnum fp.	sp.	Vestmanna-sundi fp.	sp.	Mykines-firði fp.	sp.	Nólsoyar-firði fp.	sp.	2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp.	sp.	Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp.	sp.	Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp.	sp.	Hvanna-sundi fp.	sp.	Fugloyar-firði fp.	sp.
27. mai	10.29	22.58	09.29	21.58	09.44	22.13	-	12.29	00.57	13.29	08.44	21.13	07.44	20.13	10.44	23.13	11.44	-	10.14	22.43	11.29	23.58
28. mai	11.28	23.55	10.28	22.55	10.43	23.10	00.58	13.28	01.58	14.28	09.43	22.10	08.43	21.10	11.43	-	00.13	12.43	11.13	23.40	-	12.28
29. mai	-	12.23	11.23	-	11.38	-	01.55	14.23	02.55	15.23	10.38	23.17	09.38	22.17	00.10	12.38	01.10	13.38	-	12.08	00.55	13.23
30. mai	01.02	13.41	00.02	12.41	00.17	12.56	03.02	15.41	04.02	16.41	11.56	-	10.56	23.33	01.17	13.56	02.17	14.56	00.47	13.26	02.02	14.41
31. mai	02.18	14.55	01.18	13.55	01.33	14.10	04.18	16.55	05.18	17.55	00.33	13.10	-	12.10	02.33	15.10	03.33	16.10	02.03	14.40	03.18	15.55

5 707265 100050 >